




**Prei:** Hevur tú ikki mót uppá at smyrja eyguni ov nógv, so fæst eisini neglalakk í gull- og bronsulitum, eins og fleiri sólputur hava ein farra av bronsu, sum geva kinnunum eina skyggjandi effekt.



# Sót Eldur Roykur

**SMINKAN**, SUM VIT Í HEYST OG VETUR FARA AT SÍGGJA **NÓGV** AV, VERÐUR HEIT. **SMOKEY** EYES, **GYLTIR** ELLA BRONSULITTIR **EYGNASKUGGAR** OG DIMMAR ELLA GYLTAR **KOLSIFTIR** VERÐA HEITASTU AMBOÐINI Í **SMINKUPUNGINUM**

Á mótasýningunum fyri heyst og vetur 2010 sóust koparlittu litbrigdini allastaðni. Og hóast smokey eyes hava verið inn í nakrar vetrar, so er framvegis nógv at síggja til myrka smyrslið eisini. Men vilt tú vera við í tí allarsmartasta, so eru bronsulittir eygnaskuggar eitt mást. Eisini bronsulitt tilhoyr, til dømis smúkkur og taskur, er smart í heyst og vetur.

**Prei:** Blá eygu verða enn bláari av brúnum og bronsulittum litbrigdum.



**Prei:** Minst til, at um eyguni eru nógv smurd, skulu varrarnar helst bert hava klárt gloss.

# Gylt eygu

## Fá flott eygu við gyltum og bronsulittum eygnaskugga




## Soleiðis nýtir tú **bronsuputur** til andlitið

1
Fyrst smyrt tú foundation á andlitið. Minst til at smyrja eitt gott dagkrem innanundir. Busta at enda leyst putur útyvir.

2
Nýt ein stóran kust við nattúrligum hárum til at busta bronsuna á andlitið. Legg bara bronsu á tey støð, har sólin vildi rakt snýðið (pannu, kjálkar, nasarygg og høku).

3
Legg eitt sindur av bronsara á hálsin eisini, soleiðis at hann ikki er kritahvítur ímóti andlitinum, sum sær sólbrent út. Liturin skal ikki vera eins eyðsýndur, men skal tó hóska saman við andlitinum.

**Prei:** Minst til – tað skal síggja nattúrligt út, og tú skalt helst ikki minna um eina standmynd. Minni er meira....



1

**Fyrsta stig:**
Legg fyrst ein brosulittan eygnaskugga á alt eygnalokið.



2

**Annað stig:**
Legg ein myrkari brúnan skugga í globelinjuna, sum víst á tekningini.



3

**Triðja stig:**
Legg ein gyltan eygnaskugga frá globelinjuni og upp til beinið undir eygnabrúnni. Minst til at blanda allar litirnar væl inn í hvønn annan.



4

**Fjórða stig:**
Legg ein eyelinara framvið vippunum yvir og undir eyganum. Tú kanst eisini tekna váta eygnakantin, um tú ikki hevur smá eygu. Til ber eisini at smyrja nakað av bronsulittum eygnaskugga undir eygað. Smyr at enda tvey løg av maskara.

**Prei:** Til ber eisini at nýta aðrar litir, til dømis svart, sum er tað mest nýtta til smokey eyes. Dámar tær ikki, at smyrslið skal vera ov prangandi, ber eisini til at nýta mattar, brúnar eygnaskuggar og ein beigelittan skugga undir eygnabrúnna.